Vistu vit, at ongin olja var, var eg ikki her

– Í Onglandi er oljuvinnan ein sjálvfylgja, tá tú hugsar um møguleikar fyri útbúgving. Men her er tað so nýtt, at tú kanska ikki hugsar um møguleikarnar við olju, tá tú velur útbúgving, sigur Lucy Slater. Saman við Ben Arabo hevur hon greitt næmingum frá møguligu framtíð teirra
Mynd: Kalmar Lindenskov

– Ein møgulig oljuvinna snýr seg ikki bara um, hvussu nógvur peningur kann fáast burturúr – men um møguleikar fyri arbeiði, sigur Lucy Slater, 27 ára gamal jarðfrøðingur hjá Amerada Hess. Hesa vikuna hevur hon verið á miðnámsskúlum og roynt at vakt áhuga fyri oljuvinnuni.

KATRIN PETERSEN

Tá vit hittu Lucy Slater, vóru hon og Ben Arabo í ferð við at vísa einum 2. flokki í Hoydølum, hvussu seismikkur verður bruktur, tá leitað verður eftir olju. Stór ørk við eini ørgrynnu av linjum. Við at leita eftir ljósum støðum kann tú gita, hvar olja ella gass er. Vita tað kann tú ikki.

– Eg havi sæð jarðfrøðingar, sum hava arbeitt í tvey og trý ár við einum brunni – og so kemur onki burturúr, sigur Lucy Slater.

Hon veit ikki enn, um henni dámar hetta, at tú ongantíð veit, hvat arbeiðið hjá tær endar við. Enn hevur hon bert arbeitt hjá Amerada Hess í 10 mánaðar.

Hon hevur tikið eina PhD-grad í jarðfrøði á universitetinum í Cambridge.

Ikki bara frøðingar

Lucy Slater er ein av teimum 50 jarðfrøðingunum hja Amerada Hess.

– Vit eru bert ein lítil partur av starvsfólkinum – á skrivstovuni hjá okkum eru 570 fólk ialt. Oljuvinnan er ikki bara fyri verkfrøðingar og jarðfrøðingar – nógv tann størsti parturin fæst við alt møguligt annað, so sum teldur, bókhald, trygd og tænastur. Kemur oljuvinna til Føroyar, eru nógvir pengar at vinna á tænastuøkinum.

Her hugsar hon millum annað um tey stóru supplyskipini, sum sigla út til borisøkini við øllum, arbeiðsfólkið hevur fyri neyðini.

Fult av møguleikum

Hetta við at ferðast runt og upplýsa um oljuvinnuna verður gjørt, tí føroyingar annars ikki hugsa um tað sum ein møguleika.

– Um fólk ikki vita akkurát hvat yrki tey skulu velja, fara tey ofta sama veg sum foreldrini ella systkini. Kenna tey onki til møguleikarnar innan olju, velja tey ikki tað.

Oljuvinnan er ikki bara fyri mannfólk.

– Ein av orsøkunum til, at just eg var send til Føroya, var helst, at eg eri konufólk. Fyri at vísa, at gentur eisini kunnu vera frøðingar. Jú, ábyrgd fylgir við. Men mær dámar at hava ábyrgd. Men ikki tí, tað ger mær onki, um fleiri ella færri kvinnur eru í yrkinum.

Hon er glað fyri arbeiðspláss sítt – serliga støddina.

– Amerada Hess er eitt oljufelag við miðal stødd. Hjá teimum stóru oljufelagunum hava tey ofta eina upplæringartíð upp á eini tvey ár. Eg kenni fólk, sum hava arbeitt í meira enn eitt ár, og ikki sleppa við á fundir – tey kenna tað, sum eru tey har fyri at gera kaffi. Eg byrjaði beinanvegin at arbeiða og bruka mín egnu hugskot – fekk tíðliga ábyrgd. Ofta eru smærri feløg skjótari í vendingini – avgerðirnar kunnu takast beinanvegin.

Soleiðis var eisini, tá Lucy Slater fekk starv sítt.

– Eg hevði eitt tilboð frá einari størri fyritøku, og fór so til Amerada Hess og segði: Eg havi eitt tilboð frá teimum – vilja tit ikki taka eina samrøðu við meg?

Tá hon fekk arbeiðið, visti hon, at tað fór at vera strævið.

– Amerada Hess er kent fyri, at fólk arbeiða hart. Men eisini fyri eitt gott arbeiðsumhvørvi. Ein orsøk er, at tað gongur væl hjá okkum í løtuni. Vanliga verður sagt, at ein av átta boringum gevur úrslit – hjá okkum er tað ein av fimm fyri tíðina. Tað smittar av, ger arbeiðslagið betri.

– Um vit nakrantíð fara at finna olju, veit Lucy Slater ikki at siga.

– Men um vit vistu, at onki var her, høvdu vit so ikki verið her.

Landskassin fær ikki eitt oyra av veddingarpengunum

Hóast burturlutingarlógin sigur, at 15% av vinnningunum skulu í landskassan, er tað eingin almennur stovnur, sum enn hevur fingið álagt frá landsstýrinum at krevja peningin inn. Haraftur kemur einki oyra heim av danska ríkisavgjaldinum, sum verður rindað av føroysku veddingarpengunum.

ELI GUTTESEN

Í burturlutingarlógini stendur at vinningur av burturlutingi v. m. uttan fyri landið til persón búsitandi her er undantikin inntøkuskatt til land og kommunu um vinnarin rindar eitt gjald upp á 15% av vinningum omanfyri 3000 kr. til landskassan. Men hóast landsstýrið við heimild í grein 5 hevur heimild gera kunngerðir um hvussu lógin skal fyrisitast, hevur eingin fingið álagt at umsita lógina. Hetta kann hava við sær at Toll- og Skattstovan áleggur vinnarunum vanligan inntøkuskatt upp til 50% av útgoldna vinninginum.

Avtalan

Í avtaluni millum ÍSF og Dansk Tipstjenseenste, sum Landsstýrið hevur góðkent, stendur at avtalupartarnir eru greiðir yvir at Dansk Tipstjeneste avroknar 15% av vinningum yvir 200 kr. til danska ríkiskassan. Somuleiðis stendur, at avrokningin skal vera eftir donskum reglum.

Hóast markið fyri nær avgjald skal rindast ikki er tað sama so er í báðum førum talan um 15%. Sostatt verður tilsamans talan um 30% av vinninginum, helmingurin í Danmark og helmingurin í Føroyum.

Verður einki avgjald rindað í Føroyum eigur vinningurin at koma undir vanligan inntøkuskatt, og tá er avgjaldið 15% í Danmark og skatturin útvið 50% í Føroyum. Tilsamans er tá talan um 65% í avgjaldi og vinnarin hevur tá einans 35% eftir í sín part.

Frítt at fara

Í Danmark er tað danski skattamálaráðharrin, sum hevur givið Dansk Tipsteneste loyvi at skipa fyri vedding av ymiskum slagi imóti, at Dansk Tipstjeneste rind ar 16% av samlaðu veddingarupphæddini til ríkiskassan.

Í avtaluni millum Dansk Tipstjeneste og ÍSF stendur, at einki avgjald skal rindast landskassanum fyri rættin at útbjóða spøl í Føroyum. Eisini stendur at avtalan er ikki treytað av um ÍSF fær ella ikki fær part av 16%- avgjaldinum sum Dansk Tipstjeneste rindar til ríkiskassan av føroyska spæliumsetninginum. Skal hesin partur koma føroyska samfelagnum at gagni er neyðugt við lógarbroyting í fólkatinginum og hetta kann í fyrsta lagi um yvirhøvur koma fyri í heyst.

Dansk Tipstjeneste hevur fingið frítt spæl í Føroyum at flyta pening av landinum. Enn koma eingir pengar til ítróttar- og undómsfeløg og eingin stovnur umsitur føroysku burturlutingarlógina
Mynd: Kalmar Lindenskov

Hvat úrslit Føroya Landsstýrið saman við ÍSF kann samráða seg til er enn ógreitt. Men Dansk Tipstjeneste hevur í øllum førum í avtaluni tryggja seg ímóti endurgjaldsábyrgd til ÍSF, um eingir pengar kortini koma hendavegin. Sokallaða -samstarvsavtalan-, sum í løtuni einki gevur til føroyska samfelagið, kann ikki sigast upp fyrr enn 1. januar 2001.

Jógvan Mørkøre

Kronikkin

Bankaskuld, olja og samráðingar

Føroya fólk búgva, politikarar búa, orðaskiftið er í bíðistøðu. Búgvað verður eftir, at Oljuráðleggingarnevndin skal leggja sítt álit og tilmæli fram til politiska viðgerð. Búgvað verður eftir, at bankakanningarnevndin skal koma við sini niðurstøðu. Og búgvað verður eftir næstu samráðing við danir, sum skal viðgera, hvussu føroyingar gjalda aftur rísastóru skuldina. Og samstundis búgvar henda samráðing við donsku stjórnina eftir, at bankakanningin skal verða liðug, tí hon skal ætlandi gera av, hvørt føroyingar fingu órætta viðferð og tí eiga at sleppa undan parti av skuldini.

Meðan búgvað verður, er ófriður við at koma á samgonguna. Spurningurin hevur verið reistur, hvørt oljan eigur at verða mál, ið samráðast kann við danir um. Higartil er hon komin uppi, hvørja ferð pengar eru farnir yvir um borðið.

Verða samráðingar við donsku stjórnina til heystar, so verða tær samstundis, sum løgtingið viðger, hvussu farast skal fram í oljupolitikkinum. Tað kann ikki sigast at vera serliga heppið, eftirsum oljuspurningurin hevur vist seg at vera fastur táttur í samráðingunum higartil.

Bankamál ríkismál.

Tað gav at bíta í samgonguni millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Verkamannafylkingina, tá hesir flokkar seinast vóru í samráðing við danir. Serliga millum teir báðar størstu flokkarnar, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, ið høvdu hvør sína fatan av, hvat ið høvuðskravið átti at vera í samráðingunum. Tað var tí ein sindrað gonga, ið mætti upp á Christianaborg. Javnaðarmenn við einum kravi um, at danir høvdu samábyrgd av livistøðinum í Føroyum, sambandsmenn við einum kravi um, at danir viðurkendu sær ábyrgdina av dýru bankaloysnini. Tað kom ikki stórvegis burtur úr tí samráðingini uttan hetta, at Javnaðarflokkurin nú veit, at tað er ein farin tíð, at javnaðarmenn í Danmark og Føroyum lyfta føroysku vælferðarbyrðarnar í felag. Sambandsflokkinum eydnaðist heldur ikki at koma á mál við sínum, men fekk kortini vissu fyri, at spurningurin um, hvør eigur útreiðslurnar av at lofta føroyskum bankum, skal kunna verða tikin uppaftur, tá bankakanningin er liðug. Tað fer nú at líða, men ivasamt er, um hon nær at verða liðug áðrenn samráðingarnar við danir til heystar.

Danir gjalda kostnaðin av bankabjargingini

Danir skulu gjalda, sigur løgmaður. Teir eiga at gjalda tað, sum tað kostaði at lofta bankunum - við rentu - men frádrigið virðið á bankanum, sum nú umvegis Figgingargrunninum er almenn føroysk ogn. Hetta er greið og sjálvsagd støða hjá sambandsmanni at hava. Talan var um danskt málsøki, sum danska stjórnin vardi av, og tí ma hon gjalda fyri hesum. Føroyingar gjalda av egnum lumma fyri yvirtikin sermál, og við blokkinum fyri felagsmálini, føroyingar umsita, hóast tað í dag kann vera ilt at skilja ímillum. Men í øllum førum skulu føroyingar ikki gjalda í teimum málum, sum hvørki eru sermál ella felagsmál, men donsk ríkismál. Hvørki av egnum lumma ella av blokkinum.

Hetta átti at verið einfalt. Í øllum førum hevur tað grundleggjandi prinsipiellan týdning fyri Sambandsflokkin, at skilt verður ímillum útreiðslurnar í mun til ábyrgdarbýtið, tí annars ridlar støðið undir øllum sambandspolitikki. Verður tað so, at føroyingar gjalda í málum, sum ikki eru yvirtikin, er eingin orsøk longur fyri ikki at yvirtaka. Politikkurin hjá Sambandsflokkinum í hesari øldini kann í stuttum samanfatast, at tað er ikki ráðiligt at yvirtaka málsøki, tí tað gevur føroyska samfelagnum og føroyskum skattgjaldarum óneyðugar og ov tungar byrðar afturfyri. Tí er talan um politiskt prinsippmál fyri Sambandsflokkin kanska heldur enn búskaparligt mál. Vísa danir ikki hesum ans, men verða eins avvisandi og við kravi javnaðarmanna um brøðralag innan ríkiskarm, kann tað koma at taka eisini Sambandsflokkin av fótum.

Danir gjalda ivaleyst ein part

Nú er tað ikki rættuliga sannlíkt, at danir vilja ganga so langt, at teir senda Sambandsflokkin út á somu oyðimarkarferð, sum Javnaðarflokkinum var fyri. Tá kunnu teir tað sama loysa beinanvegin, tí ein ríkisfelagsskapur uttan sterkar stuðlar í føroyskum politikki fer ikki at eiga lív lagað. Teir noyðast tí at ganga Sambandsflokkinum á møti í hesum, tí annars verður eingin flokkur í Føroyum, sum kann sannføra veljarnar um, at ríkisfelagsskapurin veitir búskaparliga trygd. Og tá er lítið gott eftir.

At so verður - at ein samráðingarloysn verður funnin, har danir slaka fyri leggmanni - gevur Gørtz-frágreiðingin eina ábending um. Hon leggur dent á í sini niðurstøðu, at bankabjargingin og nógv umstridda partabrævaumbýtið voru úrslit av samráðingarloysnum millum stjórn og landsstýri, og at eitt býti av útreiðslunum í hesum sambandi tí eisini eigur at verða ein samráðingarspurningur millum ríkispartarnir. Við at semjast um loysnirnar hava partarnir átikið sær eina felags ábyrgd.

Føroyingar medábyrgd

Hóast nógv hevur verið gitt um, at danskar ætlanir við bankabjarging og partabrævaumbýti vóru lagdar við tí fremst í huganum at dugna Den Danske Bank, donskum kreditorum og Mærsk, so skerst ikki burtur, at tað vóru føroyskir politiskir myndugleikar, ið trokaðu á, tá Sjóvinnubankin varð loftaður fyrstu ferð. Og líka lítið skerst burtur, at tað var fyri at hjálpa føroyskum vinnulívi í eini trongdari støðu. Einki løgið í tí, tí soleiðis er politikkur nú eina ferð, hóast vit oftа heldur vilja fyrigykla okkum, at onnur viðurskifti eru stýrandi.

Við at skora á og krevja eina loysn á bankakreppuni, sum føroyskir myndugleikar høvdu ávirkan á, toku føroyingar sær eisini ábyrgd av loysnunum á einum øki, teir í grundini einki høvdu við at gera. Borðið fangar. Danskt ríkismál ella ikki, so ber ikki til hjá teimum, sum brutu hurðar upp í Keypmannahavn fyri at fáa danir at lofta Sjóvinnubankanum, síðani at krevja, at danir eiga kostnaðin, tí teir áttu ikki at lovað føroyingum upp í part í hesum máli. Tískil stendur Sambandsflokkurin eisini heldur einsamallur í Føroyum við sínum kravi. Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Tjóðveldisflokkurin kunnu ikki stilla seg undir liðina á sambandsmonnum aftaná at hava myndað samstarvsleiðina og samábyrgdarleiðina í sambandi við bankabjargingunum.

Hetta veit løgmaður væl, so tá samráðingarnar eru av, og hann møguliga má viðganga, at hann ikki fekk alt, sum hann kravdi, hevur hann eisini eina góða frágreiðing, hvi føroyingar mugu gjalda sín part. Aðrir flokkar tóku yvir ábyrgd, og tað kostar - soleiðis sum sambandsmenn altið hava prædikað.

Olja afturfyri?

Spurningurin er so, um danska stjórnin kann og vil slaka fyri kravinum hjá løgmanni uttan at fáa okkurt afturfyri. Kemur bankakanningin til eina niðurstøðu, sum letur donsku stjórnina úr, er tað ikki óhugsandi, at hon strekkir svarð fyri at fáa lagt lok á málið, so tað ikki spillir í øðrum viðurskiftum.

Nú er tað ikki givið. Líka sannlíkt er tað, at bankakanningin býtir ábyrgdina út á fleiri partar, so at eingin gongur friur. Og síðani er tann møguleikin eisini til staðar, at hennara niðurstøða fyrst verður almenn, aftan á at føroyingar og danir hava verið á fundi aftur.

Verður tað so, skulu føroyingar ikki vænta sær sømdir í sambandi við afturgjalding av lánum uttan at lata okkurt afturfyri. Tvinnar eyðsyndar grundir eru fyri hesum. Stjórnin skal standa til svars fyri einum samráðingarúrsliti yvir fyri einum fólkatingi, sum ongantíð hevur forlikað seg við, at Schlüter slepti undirgrundini, og yvir fyri einum donskum almenningi, sum vil hava sera ilt við at skilja, hvi føroyingar ikki skulu geva dønum sersømdir í eini komandi oljuvinnu. Og síðani er tað spurningurin, um danskt kapitaláhugamál vilja hava ávirkan.

Illgitingar vilja summi halda. Men ilt er at skilja gongdina í bankamálinum uttan at hava í huga, at politikkur noyðist at visa sínum vinnulívi fyrilit. Hvussu tað so fer fram, kann vera so ymiskt. Í føroyskum politikki hevur tað sjáldan verið serliga væl fjalt. Nógvir av tyngstu vinnulívsmonnunum og fakfelagsformonnunum hava verið tvíandi politikarar, so lætt er at leggja eitt og eitt saman, tá politiskar avgerðir hava verið tiknar. Tað hevur verið so eyðsynt, og vanliga hevur verið óneyðugt at gitt um motivini. Samstundis tykist tað, at hava verið góðtikin táttur í okkara politisku mentan. Nakað líknandi tekur um seg á evropeiskum stað, har lobbyisma er vorðin ein dygd, har tað áður var illavorðið orð fyri fyribrigdi, ið eyðkendi eitt nú amerikanskan politikk.

Tá tað er lagið, er eingin orsøk at vænta sær, at danskur politikkur mótvegis Føroyum skuldi verið reinur fyri búskaparligum áhugamálum. Danska stjórnin má vísa sínum vinnulívi fyrilit, tá tað hevur møguleika fyri at fáa tí sømdir, eins væl og landsstýrið væntast at tæna føroyskum áhugamálum. Vinnulívsrisar sum Den Danske Bank ella A.P. Møller eru so mikið stórir og tvíandi í donskum búskapi, at teir í donskum politikki ikki hava lobbyismu fyri neyðini. Ein og hvør donsk stjórn vil í flestu førum vísa hesum fyrilit av búskaparligum grundum. Og gongur ein loysn teimum ikki eftir vild, er sloftast nóg mikið at seta knyklar í bryr og gera vart við sína misnøgd á viðtalufundunum, sum javnan eru millum politikarar og hesar risarnar.

Útseting av samráðingunum við danir?

Eitt samráðingarumfar við danir um skuldina uttan eina niðurstøðu í bankakanningini, sum gevur føroysku samráðingarnevndini trumfarnar, og uttan eina greiða føroyska støðu í oljupolitikkinum kann tí lættliga enda við einum úrsliti, har føroyski parturin noyðist at binda seg til semjur við danir um oljuna fyri at klára sínar skyldur. Tá verður ætlaða oljuorðaskiftið á tingi meira ella minni eitt eiti.

Vit hava sæð tað fyrr, tá tað hevur rátt um fiskivinnupolitikkin. Eingin ivi kann vera um, hvør hevur havt størstu ávirkanina á broytingarnar innan bankaheim og fiskivinnu síðani 1992. Tað er so ikki løgtingið, og uppaftur minni vanligi føroyski veljarin.

So skal fólkaræðið sleppa at ráða í hesum máli, sum verður avgerandi fyri allari samfelagsmenning langt inn í næstu øld, so er grund til at binda um heilan fingur. Siga vit, at fólkaræði ella demokrati er val millum møguleikar, eigur tað at verða tryggjað fólki, at orðaskiftið um oljupolitikkin sleppur at fara fram ótarnað fram til komandi val, sum so høskandi kann verða eitt oljuval. Men tað krevur ivaleyst, at samráðingarnar við danir verða útsettar.